## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Sambandsflokkurin ein falskur tryggleiki

**Jóannes Eidesgaard**
*fólkatingsmaður*



Líkt er til, at nógvir trúgvir javnaðarveljarar og nógvir aðrir eisini halda, at Sambandsflokkurin er besti garantur fyri, at loysingin ikki hendir her og nú. Tað er eins og hesi mongu halda, at skulu tey forða loysingini, so er best at velja Sambandsflokkin. Orsaka eg sigi tað, men hetta er ein falskur tryggleiki, tí í roynd og veru, er sami Sambandsflokkur bestir garantur fyri, at fullveldisbylgjan heldur fram.

Eingin einstakur politikkari hevur so nógv sum Edmund Joensen, sum løgmaður frá 1994 til 98, stuðlað uppundir loysingarveingin, og eingin politiskur flokkur hevur givið loysingarrørsluni so nógvan vind í seglini sum júst Sambandsflokkurin. Teirra fastlæsta støða, um at einki skal broytast í ríkisrættarligu støðuni, hevur lagt ótrúliga nógv brenni til loysingareldin, og tað er heilt víst, at hevði Sambandsflokkurin verið meira moderatur og dynamiskur, tá tað snúði seg um viðurskiftini við Danmark, so hevði støðan í dag verið heilt ein onnur.

Tískil er tað ørkymlandi at síggja, at júst hesin flokkur verður valdur sum mótpolur til loysingina, tí eitt er vist, at fær hann makt, sum hann hevur akt, so kunnu vit vera rímiliga vís í, at als einki hendir, og vit fáa somu faslæstu støðu komandi árini, sum vit hava havt seinastu árini.

Ein sterkur Sambandsflokkur gevur ein sterkan Tjóðveldisflokk, men onga loysn á ríkisrættarliga spurninginum. Ein sterkur Tjóðveldisflokkur gevur ein sterkan Sambandsflokk, men ogna loysn á ríkisrættarliga spurninginum. Hetta ljóðar kanska løgið, men er tó søguliga próvfast. Teir halda í veruleikanum lív í hvørjum øðrum.

Loysnin liggur millum hesar báðar flokkar, og hesa loysn umboðar Javnaðarflokkurin.

Tí er tað umráðandi, at veljararnir nú veruliga hugsa seg um og spyrja, hvør flokkur hevur sum eingin annar forðað fullveldisgongdini? Hvør flokkur hevur veruliga verið tað bullverkið, sum steðgaði loysingarfólkunum? Jú, tað hevur Javnaðarflokkurin verið. Við sínum treiskna og áhaldandi stríði bæði á Løgtingi og á Fólkatingi hevur Javnaðarflokkurin talað ímóti hesum ørskapi.

Og tað vilja vit framhaldandi gera, men vit fáa bert gjørt tað, um tit sum veljarar vísa okkum álit.

Men umframt at halda fullveldisgongdini skák í mát, so kunnu vit eisini vísa á ta leiðina, sum ein meiriluti av okkara fólki ynskir, nevniliga sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin. Og fáa vit saman við øðrum framt hesa loysn, so verður eisini friður um hetta mál, og vit kunnu fara í holt við veruligan politikk.

Sjálvandi kann tað vera trupult at heilgardera seg í politikki, men tó ber tað til við hetta valið. Ein heilgardering ímóti loysingini er at finna hjá tí flokki, sum vil inn og loysa hetta málið. Heilgarderingin er ikki at finna hjá einum flokki, sum vil seta seg hendur í favn. Vel ein flokk, sum vil út á barrikadurnar og sláast fyri sínari søk: sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

Tí skalt tú týsdagin ikki velja tær ein falskan tryggleika, men Javnaðarflokkin.

# Interkommunali felagsskapurin I.R.F. slóðar fyri í umhvørvisvernd Føroya

**Jákup Lamhauge**



Seinasta mánadag skipaði I.R.F. fyri hátíðarløtu í sambandi við at endurnýtsluvirkið við brennistøðina í Lorvík alment varð tikið í nýtslu.

Nógv fólk var komið saman, umboð fyri limakommunurnar, umboð fyri ymisku feløgini sum staðið hava fyri byggingini, landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, løgmaður, sum umsitur kommunumál og onnur, sum áhuga hava fyri nýggja tiltakinum hjá I.R.F. Millum gestirnar var undirritaði eisini saman við øðrum fyrrverandi nevndarlimum hjá I.R.F.

Fyri øll tey, sum áhuga hava fyri umhvørvismálum, var hátíðarløtan í nýggju høllini sera áhugaverd – her sá ein skjótt at talan var um at leggja nýggjar leiðir á umhvørvisøkinum – alt angaði av nýhugsan og reinleika.

Nevndarformaðurin hjá I.R.F. Hilmar Danielsen beyð gestunum vælkomin og hevði síðan sera áhugaverdar hugleiðingar um felagið og umhvørvisspurningar fyrr og nú og hvussu vit í framtíðini áttu at virka fyri til tess at halda landið reint.

Hilmar metti at felagsskapurin hevði takið á rætta endanum og vónaði hann, at stavnhaldið sum valt varð, kann verða hildið.

Síðan hugleiddi stjórin Poul Andreas Joensen um gongdina hjá I.R.F. frá byrjan og til dagin í dag – bæði viðvíkjandi útbyggingunum á ymisku økjunum sum felagið hevur staðið fyri – fíggjarspurningarnar – samanborið við alsamt vaksandi nøgdunum av burturkasti og møguligum útbyggingum í framtíðini.

Stjórin nevndi m.a. at valdið hevði staðið ímillum at byggja nýggjan brenniovn fyri 100 mill. kr. ella at royna nýggjar leiðir við byggjan av endurnýtsluskipan fyri 16 mill. kr. og við hesum at fáa ein skáa millum 5-10 ár til royndir at síggja hvussu gongdin í samfelagnum vil verða.

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum Eyðun Elttør fekk heiðurin formiliga at seta í gongd nýggju endurnýtsluskipanina og við vælvaldum orðum hugleiddi hann um umhvørvisspurningar fyrr og nú. Í hesum sambandi kom Eyðun eisini inn á hvussu føroyingar fyrr royndu at endurnýta tað sum møguligt var, t.d. klæði og annað, og skemtiliga nevndi hann orðatakið »Koyr á vestfallið«, sum hann hevði hoyrt sagt av lorvíkingi tá talan var um lutir, sum ikki kundu endurnýtast meira.

Aftaná hátíðarhaldið í endurnýtsluhøllini var døgurðaborðhald í nýumbygda bygdahúsinum í Lorvík – ein sera prýðiligur karmur um eitt hvørt veitsluhald – tillukku til Lorvíkar bygd fyri hetta megnar hús.

Og tøkkin til kokkar og tænastufólkið annars skal eisini ljóða fyri sera góða matin og vinarliga umsorgan.

Við slík høvi, sum gevast við eitt slíkt døgurðaborðhald, verða mangan heilsanir bornar fram til vertin, og nýtti løgmaður eisini møguleikan.

Løgmaður byrjaði við at takka I.R.F. fyri leiklut tess í strembanini eftir einum reinum umhvørvi í Føroyum, og nevndi hann samstundis at I.R.F. við sínum tiltøkum hevði prógvað, at kommunur í størri eindum kundu loysa uppgávur betur enn landið kundi gera. Og til seinast í røðu síni segði løgmaður, sum umsitur kommunumál, at eitt skuldu vit vita, at so leingi hann var kommunumálaráðharri, so vildi hann lova I.R.F. allan møguligan stuðul.

Sum eg framman undan nevndi, so eri eg fyrrverandi nevndarlimur í I.R.F. – frá 1993-2000 og havi eg tí kunnleika til hvussu gingist hevur hesi árini.

I.R.F. hevði eina sera trupla byrjan, og hevði hetta við sær, at felagsskapurin kom at hanga við ovurstórari lániskuld, sum fram til dagin í dag hevur verið haft um beinið, tá talan hevur verið um neyðugar útbyggingar og raksturin annars.

Við atliti til, at I.R.F. fevnir um allar kommunur í landinum – undantikið tó Tórshavnar Kommuna – og við hesum hevur átikið sær sera stórar skyldur – so hevur nevndin seinastu árini við jøvnum millumbili vent sær til landsstýrið við áheitan um hjálp til loysnir av fíggjartrupulleikum felagsins.

Men higartil hevur hetta verið uttan úrslit.

Við støði í røðu løgmans, so seti eg vón mína til,a t góði viljin verður umsettur til verk, og at felagsskapinum I.R.F. verða funnar loysnir, so vælaliðið av starvsfólkum frá leiðslu, umsiting og starvsfólkum annars kunnu líta framá í vónini um eina munadygga framtíð í strembanini eftir einum reinum umhvørvi í Føroyum.

# Trý javnsett í einum ríki

**Hans Jørgensen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Fólkatingsvalið*



Nú fara tað skjótt at vera 20 ár síðan, at Javnaðarflokkurin kom fram við uppskoti um at seta eina sjálvstýrislóg í staðin fyri heimastýrislógina, sum longu í sjeyti árunum var um at vera fulltroytt, men tíverri fingu vit ikki ljóð fyri uppskoti okkara.

Javnaðarflokkurin vil, at heimastýrisskipanin verður tikin av, og at ein sjálvstýrislóg verður sett í staðin:

- Sjálvstýrislógin skal staðfesta ein samstarvssáttmála - ein samveldissáttmála - millum Føroyar og Danmark, sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.
- Samveldissáttmálin skal áseta, at Føroya løgting, sum umboð fyri Føroya fólk, er hægsti myndugleiki í Føroyum.
- Sáttmálin tekur av allar formligar avmarkingar fyri, hvørji mál og málsøki kunnu verða yvirtikin - tað merkir, at øll mál koma undir føroyskt ræði, tá Føroya løgting ger tað av.
- Greiðar reglur skulu gerast um føroyskan heimarætt. Ríkisfelagsskapurin gevur øllum í felagsskapinum somu ríkisborgararættindi
- Tá ið alt lóggávuarbeiði Føroyum viðvíkjandi verður gjørt á Føroya løgtingi, verður fólkatingsumboðanin tikin av.
- Sum eitt hitt fyrsta stigið fram ímóti føroyskum sjálvræði, verður sett ein rættarkommisjón at fyrireika yvirtøku av rættarskipanini.
- Verandi stýrisskipanarlóg verður støðugt bygd út at rúma broytingunum í nýggju stjórnarskipan Føroya.
- Sjálvstýrislógin skal innihalda ásetingar um, hvussu samveldissáttmálin skal sigast upp, um so er, at føroyingar ynskja at fara úr ríkisfelagsskapinum.

Fólkaatkvøða í Føroyum staðfestir endaliga sjálvstýrislóg og samveldissáttmála.

Minnist til, at fremst í skyldri Javnaðarfloksins stendur frælsi, samhaldsfesti (solidaritetur) og vælferð fólksins. Tí er ikki vist, at føroyingar fara at taka stig til at fara úr ríkisfelagsskapinum, sjálvt um búskaparligir og fyrisitingarligir møguleikar vera fyri tí.

Fyri meg persónliga, kennist felagsskapur í eini størri eind skilagóð, um skipanin altso er bygd á veruliga umsorgan og ábyrgd yvir fyri hvørjum øðrum -solidariteti. Eg síggi tað sum eina góða skipan, at tvey lond, sum eitt nú Danmark og Føroyar gera ein sáttmála sum tvey javnsett lond í ríkisfelagsskapi, at tey til eina og hvørja tíð vara av hvørjum øðrum og skapa javnað partanna millum.






verður í Ítróttarhøllini
í Vági dagarnar
29. nov. - 2. des. 2001

*Enn eru nakrir heilt fáir básar eftir, nærri fæst at vita á tlf. 227290*

1905 VB



SKÍÐFERÐ - beinleiðis til Fraklands
19.-26. januar 2002
Seinasta tilmeldingarfreist 20. nov. 2001
MB-Tours MB
Tel 32 21 21 · Fax 32 21 22 · mb-tours@mb-tours.com
www.reproz.com




GOYMSLUSØLA
-bert leygardagin

Mahogni klædnaskáp
v/ spegl í hurð, fyrr 6000,-
Nú 4000,-
Runt mahogni borð
Nú 4000,-
Vitrinuskáp
Nú 2000,-
3 pers. koboltblá sofa
fyrr 7.000,-
Nú 5400,-
Vegnergyngustólir
fyrr 7.400,-
Nú 5400,-

Kirkjuljósakrúnur
Kelimteppir ca. 200x300
Koboltblá GUBI 3 pers. sofa+stól
Tunnubrenniovn
Chatol

KJALLARIN
list og húsgøgn
Tórfinsgøta 43 - Tlf. 31 37 20

Sosialurin - Tel. 31 1820